## Tigarin vann Major

Síðsta árliga Major-kappingin í golf var á skránni í amerikanska býnum, Tulsa, um vikuskiftið, og undan síðsta degnum í gjár var tað amerikanska golffenomenið, Tiger Woods, sum lá á odda. Á síðsta degnum megnaði Woods eisini at halda leiðsluna, og sjálvt um Woody Austin og Ernie Els gjørdi sítt til fyri at fáa Tiger Woods aftur, so bar hetta ikki til. Sostatt tryggjaði Tiger Woods sær 13. sigurin í eini Major-kapping í lívinum, og hann staðfestir har við, at hann er tann sterkasti golfspælarin í heiminum.



## Lantz úr Brøndby

Sterki svenski miðvallarleikarin hjá Brøndby, Marcus Lantz, tykist nú vera ávegis úr danska felagnum. Tað er fyrrverandi felagið hjá Lantz, Helsingborg, sum ætlar at tryggja sær leikaran. Marcus Lantz er ikki í hópinum hjá Brøndby, sum seinni í dag skal spæla ímóti Viborg í Superliguni, og sum skilst, so ætlar Helsingborg at fáa endaliga avtalu í lag við Brøndby og leikaran sjálvan seinni í dag. Sum tað ljóðar, so manglar Helsingborg bert at avtala rætta prísin við Brøndby, áðrenn Lantz verður Helsingborg-leikari.

# B36 skoraði upp á málmøguleikarnar

**Hampiligt spæl men at kalla eingir kjansir vóru á Skála í dystinum millum Skála og B36. Munurin á liðunum var tó, at B36 skoraði upp á teir kjansirnar, sum liðið fekk**

FÓTBÓLTUR

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

*Skála*

*B36*



*Fáir kjansir vóru í formuladystinum á Skála, men B36 megnaði at skora upp á sínar, og tí vunnu teir dystin 2-0.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sunnudagin var formuladystur á Skála, har Skála tók ímóti B36. Undan dystinum máttu teir hvíta úr Havn helst taka favoritrolluna á sínar herðar, og B36 megnaði eisini at sleppa av Skála við øllum trimum stigunum í einum dysti, sum helst átti at verið endaður við mávleysum javnleiki.

Dysturin á Skála bleiv einki stórt fótbóltsupplivilsi. Til tíðir vístu liðini hampiliga gott fótbóltsspæl við skjótum og góðum avleveringum, men so skjótt sum liðini nærkaðust málinum hjá mótstøðuliðnum, so var antin hugflogið ov lítið ella verjurnar ov sterkar.

Sjálvt um næstan eingir kjansir vóru í dystinum, so megnaði B36 í tveimum førum at fáa bóltin í málið hjá Skála, og sostatt vann B36 eisini dystin 2-0.

Dysturin á Skála er helst eisini eitt klassiskt dømi um, at hepni ofta fylgir teimum ovaru liðunum, og at hesi í flestu førunum duga betur at revsa mótstøðuliðini, enn niðaru liðini gera tað.

### Langskot fekk gongd á B36

Áskoðararnir á Skála blivu í fyrra hálvleiki vitni til ein dyst við hampiligum spæli, men har kjansirnir vóru sera fáir fyri ikki at siga slett eingir.

Tað var týðiligt, at bæði liðini royndu og vildu heldur spæla fótbólt í staðin fyri at sparka fótbólt, men allíkavæl var hesin hálvleikurin einki at rópa hurrá fyri.

Onkuntíð var upplegg til møguleikar í báðum endunum, men hvørja ferð liðini nærkaðust málunum, so megnaðu tey á ein ella annan hátt at lorka møguleikarnar burtur. Um hetta var orsaka av góðum verjuspæli ella minni góðum álopsspæli skal vera ósagt.

Tá knappur hálvur tími var farin kom tó brádliga eitt mál á Skála, sum flestu áskoðararnir einki skiltu av. Klæmint Matras hjá B36 fekk bóltin nakað framman fyri miðjuna, og úr eini 40 metra fjarstøðu valdi hann at smekka til. Bólturin sat heilt úti við stongina, men sjálvt um málið var gott, so er eingin ivi um, at Skálamálmaðurin má taka málið á sín kappa. Hann tóktist slett ikki vera klárur til, tá Klæmint lat kanónina ganga, og hann hevði helst heldur ikki væntað eitt skot úr so stórari fjarstøðu. Í málið fór bólturin tó, og tí var hálvleiksstøðan eisini 1-0 til gestirnar.

### B36 avgjørdi

Ikki kann sigast annað um seinna hálvleik, enn at hann var at kalla líka sum fyrri hálvleikur. Liðini royndu eftir førimuni at spæla fótbólt, men málmøguleikar vóru so at siga eingir.

Tá eitt knapt korter var farið av seinna hálvleiki, kom fyrsta veruligi málmøguleikin eftir steðgin. B36 førdi bóltin fram eftir vøllinum, og hann bleiv spældur til Alex dos Santos, sum kom at standa rættiliga leysur í vinstru síðu í brotsteiginum.

Santos valdi at senda bóltin inn fyri málið, og har var Sylla fyrstur á bóltinum og stýrdi honum í málið. Toppskjúttin í formuladeildini hevði aftur sligið til, og nú var støðan brádliga 2-0 til gestirnar úr B36, og dysturin tóktist avgjørdur.

Sjálvt um Skála royndi ymsikt síðsta hálva tíman av dystinum, so komu teir ikki fram til nakað serligt. Onkur smávegis kjansur var framman fyri B36-málið, men verjan hjá gestunum stóð stinn, og tí megnaði heimaliðið ikki at fáa nakað mál.

Samanumtikið var hetta ein dystur við sera fáum møguleikum, og tað rættasta hevði kanska verið, at hann endaði við málleysum javnleiki. B36 vísti tó, hví teir eru í toppinum. Teir fingu mál upp á sínar møguleikar, og við hesum halda teir trýstið á oddaliðið, NSÍ, sum eisini fekk fult á Argjum.

## - Taka einki fyri givið

Venjarin hjá B36 var væl nøgdur við sigurin á Skála, men hann helt, at skálamenn vóru ikki lættir at spæla ímóti.

- Skála eru øgiliga ringir at spæla ímóti. Teir duga væl at spæla bólt, teir trýsta høgt og flyta seg væl, so vit máttu justera eitt sindur í hálvleikinum fyri at steðga teimum, og hetta eydnaðist væl, segði Kurt við Útvarpið eftir dystin.

Hann vildi tó bert tosa um komandi dyst, tá hann bleiv spurdur um vónirnar at vinna meistaraheitið.

- Vit taka ein dyst á gangin og taka einki fyri givið. Vit arbeiða hart fram ímóti næsta dystinum komandi sunnudag, sum verður ímóti VB/Sumba.

At enda bleiv Kurt spurdur um heldur sjáldsama málið hjá Klæmint Matras.

- Vit venja skotvenjing hvønn fríggjadag, og endiliga síggja vit úrslitið av hesum, segði venjarin við einum smíli.

## - Fáir kjansir og tvey mál til teir

Soleiðis tók Skálavenjarin, John Petersen saman um, tá hann tosaði við Útvarpið eftir dystin ímóti B36.

- Hetta er ein dystur, sum koyrir næstan í tómgongd. Bæði liðini hava rímiliga gott spæl fram eftir vøllinum, men so hendir ikki meir. Her eru eingir kjansir í dystinum - kanska ein og tveir til hvørt liðið – og teir fáa tvey mál.

John helt tað eisini leiðslumálið hjá B36 vera rættiliga keðiligt.

- Tað er sjálvandi keðiligt at tapa ein slíkan dyst, og serliga keðiligt er tað eisini, at vit annað vikuskiftið á rað fáa mál ímóti okkum frá sera stórum avstandi.